# Tað sum vendir niður...

Fríggjadagin í farnu viku helt stýrið í NORA sín fyrsta fund við nýggja stjóranum Lars Thostrup.

Fundurin varð hildin í hølunum hjá stovninum í Havn, og møtt vóru umboð úr øllum teimum fýra londunum í NORA – Føroyum, Noregi, Íslandi og Grønlandi.

Endamálið við NORA er at gera sítt til, at vinnuligt samstarv í Norðuratlantshavi kann økjast og mennast. Hetta kann gerast við menningarverkætlanum og við at skapa umstøður fyri at geva royndirnar víðari innan landbúnað, ferðavinnu, havumhvørvi og tey lokalu samfeløgini.

Frammanundan slíkum fundi verður gjørt eitt stórt fyrireikandi arbeiði at lýsa øll málini so væl og virðiliga fyri fundarluttakarunum fyri at nevndararbeiðið kann gerast meiri effektivt. Soleiðis var eisini gjørt hesa-ferð, - kortini við einum undantaki.

Umboð fyri Sosialin fekk høvið at hitta umboðini og taka eina mynd av stýrinum og starvsfólkunum á skrivstovuni í Havn.

Tað var í hesum sambandi at grønlendska umboðið í stýrinum gjørdi vart við, at grønlendska flaggið í roynd og veru vendi øvugt – tað sum vendi niður vendi upp. Og øvugt!

Stjórin og eitt av starvsfólkunum bóru skjótt at og fingu snarað grønlendska flagginum 180 stig, soleiðis at tað vendi rætta vegin.

Nú varð greitt til myndatøkuna av fundarluttakarunum frammanvert tey fýra flaggini.

**sb.**



*Jákup Sørensen og stjórin Lars Thostrup vóru skjótir at vinda grønlendska flaggið rætt á stong í fundarhølunum hjá NORA í Havn*

*Mynd: Snorri Brend*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av útnyrðingi, um kvøldið veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av suðri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 9 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 25 |
| Athen | 22 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 18 |
| New York | 21 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 20 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt djúpt lágtrýst, 970 hPa. við Hetland fer í landnyrðing. Eitt hátrýst, 1032 hPa. vestan fyri Biscaya fer í landnyrðing og ein hátrýstryggur til Grønlandsfjørðin verður við Føroyar mikudagin.




**Í dag:**
Hátrýstið við Hebridurnar fer spakuliga í landnyrðing og gevur góðveður á okkara leiðum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/9 kl. 06⁰⁰ – 23/9. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,5°
Minsti hiti máldur í september: -0,5° - Mesti hiti máldur í september: 19,5°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 7,0 mm – mált frá 22/9 kl. 06⁰⁰– 23/9 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í september: 136,0 mm


**Tiltøk í Miðlahúsinum í september**

***24. september***
**Alzheimersfelagið**

**FØROYABANKI**
*stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum*


## VESTFALLSKYRRINDI

4. september Mánin næstur jørðini
5. september Seinna kvarter
13. september Tendring
19. september Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 25. sept. | 06.00 | 18.19 | 05.00 | 17.19 | 05.15 | 17.34 | 08.00 | 20.19 | 09.00 | 21.19 | 04.15 | 16.34 | 03.15 | 15.34 | 06.15 | 18.34 | 07.15 | 19.34 | 05.45 | 18.04 | 07.00 | 19.19 |
| 26. sept. | 06.38 | 19.00 | 05.38 | 18.00 | 05.53 | 18.15 | 08.38 | 21.00 | 09.38 | 22.00 | 04.53 | 17.15 | 03.53 | 16.15 | 06.53 | 19.15 | 07.53 | 20.15 | 06.23 | 18.45 | 07.38 | 20.00 |
| 27. sept. | 07.22 | 19.45 | 06.22 | 18.45 | 06.37 | 19.00 | 09.22 | 21.45 | 10.22 | 22.45 | 05.37 | 18.00 | 04.37 | 17.00 | 07.37 | 20.00 | 08.37 | 21.00 | 07.07 | 19.30 | 08.22 | 20.45 |
| 28. sept. | 08.08 | 20.34 | 07.08 | 19.34 | 07.23 | 19.49 | 10.08 | 22.34 | 11.08 | 23.34 | 06.23 | 18.49 | 05.23 | 17.49 | 08.23 | 20.49 | 09.23 | 21.49 | 07.53 | 20.19 | 09.08 | 21.34 |
| 29. sept. | 09.00 | 21.28 | 08.00 | 20.28 | 08.15 | 20.43 | 11.00 | 23.28 | - | 12.00 | 07.15 | 19.43 | 06.15 | 18.43 | 09.15 | 21.43 | 10.15 | 22.43 | 08.45 | 21.13 | 10.00 | 22.28 |


Lesið **Sosialin** -tað loysir seg